# Saman stendur Suðuroy sterkari

JASPUR VANG
Tvøroyri



**Vit mugu leggja tað, sum farið er aftur um bak, vísa hvørjum øðrum álit, taka støðu og síðani í felag seta dagsskránna**

Suðuroy er landafrøðiliga ein samanhangandi eind og tí ein arbeiðsmarknaður fyri seg, eins og vit í stóran mun eru felags um eitt nú eldraøkið, skúlaøkið og mentunarøkið. Tað er av størsta týdningi, at hesi viðurskifti verða samskipað á skilabesta hátt, soleiðis at sum fragast fæðst burtur úr givna tilfeinginum. Landspolitiskt eru vit eitt valdømi. Tí er eisini ógvuliga umráðandi, at økið stendur saman út eftir, finnur felags stev, og fær sum fragast burtur úr landspolitiskt.

**Miðnámsskúlin ein landspolitisk ræðumynd**
Longu við løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 varð heimilað landsstýrinum at fara undir bygging av miðnámsskúla og næmingaheimi í Hovi. Eisini vóru ætlanir frammi um at byggja handilsskúla í Suðuroynni. Ì dag – 18 ár seinni - eru tvinni grundøki gjørd byggibúgvin til Miðnámsskúla, men eingin skúli er bygdur, meðan næmingaheimið, sum var við í upprunaætlanini, er gloppið okkum av hondum. Ætlaninar um bygging av handilsskúla gjørdust av ongum, eins og lands- og kommunupolitiskur ófriður framvegis ræður viðvíkjandi byggingini av miðnámsskúla og nú eisini um bygging av ellis- og røktarheimið. Hóast talan er um landspolitisk málsøki burtur av og ábyrgdin tí fult og heilt liggur hjá okkara landspolitikarum, eri eg sannførdur um, at høvdu vit í 1988 eitt felags forum, sum vegna oynna sum heild tók avgerðir og setti dagsskránna mótvegis teimum í økinum valdu landspolitikarunum og mótvegis landspolitisku myndugleikunum sum heild, var støðan øðrvísi. Nú er bert at vóna, at ígongdverandi ætlan um bygging av Miðnámsskúla og byggingin av ellis- og røktarheiminum, soleiðis sum nakrar av kommununum ynskja tað, verða framdar í verki.

Allir landspolitisku flokkarnir hava gjøgnum árini so ella so verið við til at flyta miðnámsskúlan aftur og fram millum bygdirnar í oynni. Tí tænir tað ongum endamáli at gera málið flokkspolitiskt, soleiðis sum landspolitikarar og okkurt valfelag í oynni gera.

**Kommunupolitiskar sólskinssøgur**
Tá sagt verður, at kommunupolitikararnir í oynni ikki kunnu samstarva og ikki hava álit hvør á øðrum, er tað ikki veruleikin. Hettar varð so staðiliga prógvað, tá báðar tær størru kommunurnar í oynni, eftir innbjóðing frá Vágs Býráð, á fundi í Øravík tann 27. apríl 2005 samdust um, hvar ávikavist miðnámsskúli og ellis- og røktarheim kundu verða bygd, samstundis sum kommunurnar vóru til reiðar at fara saman í eina kommunu. Á fundinum bleiv givið og tikið og fingu vit ikki øll okkara vilja. Tað týdningarmesta var tó, at ein semja um eina væl nýtiliga ætlan varð fingin í lag. Hóast tað elvdi til nakað av misnøgd, at báðar tær størru kommunurnar vóru í so bráðar, og ikki savnaðu sær undirtøku hjá smærru kommunum í oynni, áðrenn farið varð norðuríl andsstýrið, má samanumtikið sigast, at talan var um eina stórhending. Hugstoytt og niðurbrótandi var tað hinvegin, at landspolitikararnir dagin eftir tóku kommunurnar av ræði og kolldømdu loysnina. Hettar ítøkiliga dømi um manglandi stev millum kommunupolitikarar og landspolitikarar í oynni, elvdi til stóra ónøgd og misálit á landspolitikararnr, heldur enn á kommunupolitikararnar í oynni. Lemjandi ófriðurin um bæði miðnámsskúla/ellis- og røktarheim og um kommunusamanlegging helt tí áfram og breiddi seg seinni til bý- og bygdaráðini.

Umframt at kommunurnar í oynni samstarva um felags barnaverndarnevnd, eru kommunurnar eisini á einum málið um eitt nú bygging av eftirskúla í Hvalba, eins og kommunurnar eru samdar um arbeiðsleist og fígging av Suðuroyarætlanini. Eisini á øðrum økjum er samstarv um alla oynna og hava t.d. bæði svimjifeløgini við góðum úrslitum samstarva í longri tíð, eins og samstarv hevur tikið seg upp millum bóltfeløgini. Stevið er kanska ikki helt gott enn – tó munin fragari enn millum landspolitikararnar í oynni.

**Fyrimunir við at savnað oynna í eina kommunu**
Nakrir av fyrimunum, ið hava verið nevndir, eru í høvuðsheitum hesir:

Ein sterk, ógegnig og munadyggari kommunal umsiting, sum, umframt at røkja verandi uppgávur betur, hevði verið før fyri at røkt fleiri og størri uppgávur, sum í dag skapa arbeiðspláss í meginøkinum.

Grundarlag fyri størri serkunnleika á tí tekniska økinum og innan eitt nú løgfrøði, grannskoðan og búskaparfrøði á staðnum, heldur enn at rinda fyri serkunnleika aðra staðni frá, umframt at hettar hevði skapt tiltrongd, vælønt størv í økinum.

Felags stev á landspolitiskum stigi. Hettar soleiðis at oyggin sjálv setir dagsskránna og skipar økið sum eina heild.

Eina munadygga fíggjarætlan, heldur enn fleiri smáar fíggjarætlanir.

Yvirskipaða íløguætlan fyri økið, heldur enn sum nú, har smærri eindirnar hvør sær gera somu íløgur.

Fyrimunirnir, sum eru ávístir omanfyri, eru yvirskipaðar, ítøkiligar og eftir mínum tykki neyðugar broytingar, um vit skulu menna oynna aftur.

**Vansarnir við at savna oynna í eina kommunu**
Teir vansar, ið hinvegin hava verið nevndir, eru í stuttum hesir.

Fyrimunir og vansar eru ikki nóg væl lýstir fyri borgarunum.

Politikararnir hava ikki álit hvør á øðrum og duga ov illa at tosa saman.

Talan er um nýtt og í nógvar mátar ókent evni.

Her er talan um heldur óítøkiligan, kenslubornan ótta fyri broytingum. Tá sagt verður, at fyrimunir og vansar ikki eru nóg væl lýstir og at talan er um nýtt - og í nógvar mátar ókent evni, er talan um eina ávísa undirmeting av borgarunum. Tosað hevur nevniliga verið um kommunusamanleggingar nú í fleiri ár, eins og kommunur aðrastaðni í landinum hava lagt saman – og tað við góðum úrslitum. Hvat álitinum og tosingarlagnum millum kommunupolitikarnar í oynni viðvíkur, er tað í høvuðsheitum landspolitisk ógreiða, eitt nú viðvíkjandi ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur, umframt landspolitisk uppílegging í kommunal viðurskifti, sum hevur elvt til sundurlyndi í oynni. Tíverri er eisini komið fyri, at einstakir kommunupolitikarar í maktarloysi ikki hava kent sær hógv og tí hava úttalað seg knortlut og ógvusliga til fjølmiðlarnar og harvið borið brenni á bálið. Eg eri tó sannførdur um, at langt teir flestu kommunupolitikararnir í oynni hava álit hvør á øðrum og eru til reiðar at tosa seg til rættis, soleiðis sum gjørt varð á omanfyri nevnda fundi í Øravík.

Við støðugt fallandi fólkatali, versnandi inntøkugrundarlag, sum gerst alt meira óstøðugt, eins og alders- og kynsbýtið gerst alt meira avlagað, eru ikki stundir at draga málið enn longur út. Okkara ungdómur hevur hvørki hug ella stundir til at bíða – tey flyta burtur.

**Tvær kommunur í einari oyggj er ikki loysnin**
Eydnast tað ikki at leggja oynna saman í eina kommunu á hesum sinni, er betur at varðveita núverandi bygnað, heldur enn at býta oynna í tvær kommunur. Verður talan um tvær kommunur, gleppa omanfyri ávístu fyrimunir okkum av hondum komandi árini, eins og tað í mínum hugaheimi er lítil ivi um, at óhepnað kapppingin millum tey bæði størru plássini í oynni fer at halda áfram og enntá økist. Sum støðan er í dag við 7 kommunum, síggja vit eisini týðuliga, at valdu landspolitikararnir verja borg og gjara út, alt eftir um teir hava sítt heimabeiti sunnan - ella norðan fyri Hovstúgvu. Leggja vit ikki saman í eina kommunu, verður oyggin mest sannlíkt framhaldandi landspolitiskt sindrað í tvinnar hálvur, har Suðuroyggin sum heild verður stórið taparin. Tí er tað umráðandi, at vit hava dirvið til at standa saman og vísa hvør øðrum álit, fyri síðani at taka avgerðir, Suðuroynni sum heild, fjøldini og framtíðini til frama.

**Gamlar landspolitiskar syndir**
Tíverri eru enn nøkur, ið sum undarførslu fyri samanlegging í eina kommunu, gera tað til ein kommunupolitiskan trupulleika, at ávísir landsstovnar, okkurt virki, sum hevur verið hálvalment, og onkur almennur skúli, gjøgnum árini eru flutt av Tvøroyri ella úr Vági. Her er enn einaferð talan um avgerðir, tiknar í landsstýri, á løgtingi ella í landsfyrisitingum í Havn. Tað er tí ikki rætt og rímuligt at skjóta kommunupolitikarum í Suðuroynni hesi viðurskifti í skógvarnar. Leggja vit oynna saman í eina kommunu og stilla ópolitiskt upp, tá val verður til eitt felags kommunustýri, vildi eg mett, at vit í størri mun sleppa undan slíkum órógvandi illgitingum.

Lat okkum taka við læru, lata tað sum farið er liggja og í felag ganga framtíðini á møti.

# Viðmerking til Sølvar Michelsen

HERÁLVUR JACOBSEN

Í Dimmu og Sosialinum 28. novembur sigur Sølvar Michelsen úr »Sig neibólkinum« soleiðis:

*»Ongastaðni vísir søgan okkum, at samkynd hava verið fyri happing sum bólkur…«.*

Tíverri er hetta ikki satt. Í hvussu er ikki, um vit eru samd um, at happing í ringasta føri elvir til harðskap og týning.

Fúlasta dømið um forfylging av samkyndum er, sum ikki einaferð, úr Nazitýsklandi og hersettu londunum. Í vitloysinum at reinsa 1000-ára ríkið fyri spillu, vóru saman við jøðum, sigoynarum, Jehova vitnum, brekaðum, kommunistum, sosialdemokratum og vinstrahallum annars, eisini samkynd savnað í legur. Har skuldu samkyndu menninir bera ljósareyðan tríhyrning seymaðan á klæðini. Kvinnurnar bóru svartan tríhyrning. Eina meting um, hvussu nógv samkynd lótu lív í jagstranini ber sjálvandi til at finna fram.

Men í Amsterdam, framman fyri Vesturkirkjuni, er í hvussu er eitt »homomonument«. Tríggir tríhyrningar úr ljósareyðum granittsteini, til minnis um tey samkyndu, ið vórðu jagstrað og týnd undir nazismuni. Javnan liggja blómur við minnismerkið.

Og lat okkum dvølja í Amsterdam og í Hollandi. Tí hagar rýmdu í síni tíð øll tey, ið talaðu fyri frælsari hugsan. Eitt nú John Locke, sum í 1689 gav út bókina »Bræv um tolsemi«, ið væl er verd at lesa í dag.

Aftan fyri Vesturkirkjuna í Amsterdam liggur Anne Frank Huis, húsini har Anna Frank, saman við foreldrunum og nøkrum vinfólkum teirra, ið øll vóru jøðar, goymdi seg fyri nazistisku útreinskanini. Uttan fyri Vesturkirkjuna stendur standmynd av Onnu Frank. Standmyndin er sera lítil, og hetta undrar í fyrstani, serliga nú Sigmundur Brestisson stendur framman fyri okkara Vesturkirkju við útbreiddum ørmun sum ein annar DiCaprio í stevninum á Titanic. Men sum frálíður skilir tú, at myndin av hesi lítlu gentuni við boygdum høvdi og hondunum samanløgdum framman fyri sær móti kjólanum, júst er rætta myndin. Hótti hendan lítla gentan germansku rasuna?

Men nazistarnir vóru ikki teir einastu, ið forfylgdu samkyndum. Í Sovjetsamveldinum taldust homoseksuel ikki imillum homo-sovjetika (nýggja sovjetmenniskjað). Samkynd vórðu mett sum fordervað og sjúk. Tí varð, við vísindaligum framferðarhátti, roynt at grøða samkynd. Mær vitandi eru hesar royndir ikki at finna í lesnaðinum, ið læknar um okkara leiðir brúka.

Í frælsa heiminum var upp móti nýggjari tíð (60-ini) lógarbrot at verða samkyndur, so sum onglendingurin segði: »Leypst tú úr skápinum, so varð tú læstur inni«. Og í USA metti McCarthy tey samkyndu at vera næstan líka stór hóttan móti tjóðini sum kommunistar.

Vit kunnu siga ja ella nei, men at gloyma ella tiga hesar sannleikar burtur er skammiligt móti minninum um tey, ið rakt vórðu.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.